Erhard Joensen
Helgi Abrahamsen
Kaj Leo Holm Johannesen
Eyðdis Hartmann Niclasen
Johan Dahl
Magnus Rasmussen
vegna Sambandsflokkin

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu
(Áseting av lofti í tøkugjaldinum fyri part av laksaframleiðsluni, sum fer til meirvirking)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 64 frá 15. mai 2014 um loyvisgjald á alivinnu, sum broytt við løgtingslóg nr. 162 frá 24. desember 2015, løgtingslóg nr. 180 frá 21. desember 2018, § 39 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021 og løgtingslóg nr. 75 frá 1. juni 2023, verður í § 2 a, aftan á stk. 1, sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 2*. Fyri partin av laksaframleiðsluni, sum verður brúktur til víðari framleiðslu, verður tøkugjald goldið eftir hesari løgtingslóg, tó upp til í mesta lagi 7,5% sbrt. skjali 2."
Stk. 2-4 verða eftir hetta stk. 3-5.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.

Almennar viðmerkingar
Í sambandi við viðgerðina av løgtingsmáli nr. 93/2023 (Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu (Broytingar í tøkugjaldinum)) varð víst á, at tá talan er um at áseta tøkugjaldið í alivinnuni, so er umráðandi, at atlit verður tikið til víðari framleiðslu (meirvirking).

Tøkugjaldið og serliga tøkugjaldsstigin eigur ikki at vera ein forðing fyri, um vit kunnu meirvirka laksaúrdráttir í Føroyum. Serskattaskipanir ella onnur framleiðslugjøld eiga sum útgangsstøði ikki at vera stýrandi fyri, hvat endaprodukt verður valt at framleiða.

Avbjóðingin við tøkugjaldinum sum tað virkar í dag við einum stiga við nógvum trinum er, at man má rokna eitt rættuliga høgt váðaískoyti á VAP framleiðsluna (Value Added Products). Hetta ger, at fyritøkan verður minni kappingarfør, enn man vildi verið, um tøkugjaldsstigin var lægri.

Ein rímiliga stórur partur av aliframleiðsluni í Føroyum fer til sokallaðu VAP framleiðsluna. Hesir meirvirkaðu laksaúrdráttir verða seldir eftir langtíðarsáttmálum, ið vanliga ganga 3-12 mánaðir fram í tíð. Tí er tað avgerandi fyri, um vit framhaldandi kunnu hava eina meirvirking í føroysku alivinnuni, at fyri tann partin av laksaframleiðsluni, sum fer til meirvirking, verður ásett eitt loft í tøkugjaldinum á 7,5%. Hetta merkir ítøkiliga, at fyri ta mongd av framleiðsluni, ið verður brúkt til víðari framleiðslu, verður tøkugjaldið goldið eftir galdandi stiga, tó upp til í mesta lagi 7,5%.

Uppskotið hevur ikki verið til ummælis.

Avleiðingarnar av uppskotinum

Tað er trupult at siga nakað eintýtt um avleiðingarnar av uppskotinum annað enn, at í teimum tíðarskeiðum, har marknaðarprísurin er meira enn 20 kr/kg hægri enn framleiðslukostnaðurin, fer minni at koma inn í tøkugjaldi fyri tann partin, sum fer til víðari framleiðslu. Hinvegin fer meira at koma inn í persónsskatti, bæði til land og kommunur.

Serligar viðmerkingar

Til § 1
Sambært ásetingini verður tøkugjaldið fyri tann partin av laksaframleiðsluni, sum fer til víðari framleiðslu (meirvirking), ongantíð meira enn 7,5%. Við meirvirking er at skilja alt, sum ikki er feskur, heilur, ísaður laksur, feskur, avhøvdaður, ísaður laksur, frystur, heilur laksur ella frystur avhøvdaður laksur.

Til § 2
Lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

Á Løgtingi, 24. oktober 2023

Erhard Joensen Helgi Abrahamsen Kaj Leo Holm Johannesen

Eyðdis Hartmann Niclasen Johan Dahl Magnus Rasmussen